Færøernes Kommando:

# Fyrstu sivilu næmingarnir fingið prógv

Í vikuni fingu Hans Bogi Ellefsen úr Miðvági og Helena Bærentsen úr Havn prógv sum ávikavist logistikassistentur og skrivstovunæmingur hjá Færøernes Kommando í Mjørkadali.

Tað var í 2003, at hugskotið kom fram um at seta sivilar næmingar hjá Færøernes Kommando. Eftir at hava fingið góðkenning frá Yrkisdeplinum vórðu tveir næmingar settir sum teir fyrstu nakrantíð á einum militerum arbeiðsplássi í Føroyum.

Í august 2004 var Hans Bogi Ellefsen úr Miðvágur settur sum logistiknæmingur og Helena Bærentsen úr Havn varð sett sum skrivstovunæmingur. Lærutíðin var tvey ár.

Jens B. Jørgensen sersjantur var lærumeistari hjá Hans Boga, og Jan Olsen yvirsersjantur var lærumeistari hjá Helenu.



*Í vikuni fingu Helena Bærentsen úr Havn og Hans Bogi Ellefsen úr Miðvági prógv sum ávikavist skrivstovunæmingur og logistikassistentur hjá Færøernes Kommando í Mjørkadali*

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Olivur Veihe Sundberg** fer frá Holsteinsborg kirkju í Rude, týsdagin 22. august kl. 13.00.

**Karl Steensen, úr Klaksvík**, andaðist í Skudeneshavn á Karmoynni í Noreg 17. august, 75 ára gamal.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara elskaða mamma, vermamma, omma og langomma

**Kathrine Zachariassen**

ættað úr Streymnesi

búsitandi í Tórshavn

andaðist á Landssjúkrahúsinum hóskvøldið 17. august 71 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

*Vegna tey avvarðandi*

**Jákup og Grækaris v/familju**

## Tøkk

Hjartans tøkk til tykkum øll, sum gjørdu mær 60 ára føðingardagin 2. august so minnisríkan.
Tøkk fyri gávur, fjarrit og blómur.
Tøkk fyri talur og sang og tøkk til tykkum, sum hjálptu til.
Tað var stuttligt at síggja so mong.
Harrin signi tykkum øll.

**Marjun Joensen King**

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu, tá kæra mamma, vermóðir, omma og langomma okkara

**Sunneva S. Thomassen**

Klaksvík

andaðist og varð jarðað.
Tøkk til tykkum í Heimarøktini, á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og á Landssjúkrahúsinum.
Tøkk, Niels Pauli, fyri góð og troystarrík orð. Tøkk til kirkjutænarar, sangarar, urguleikara og starvsfólk í kapellinum.
Tøkk fyri vitjanir og uppringingar, og fyri blómur og kransar.
Tøkk til tykkum, ið á ymiskan hátt hjálptu til í samband við jarðarferðina og ervið, og til tykkum mongu, ið fylgdu mammu til hennara seinasta hvíldarstað.
Hjartaliga tøkk øll somul.

*Vegna tey avvarðandi*

**Ørvur, Einar, Kjartan og Marianna**

## Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu, tá kæra móðir, vermóðir, omma og langomma okkara

**Jansy Feilberg**

andaðist og varð jarðað.
Tøkk til øll, ið hjálptu til í samband við jarðarferðina.
Ein serstøk heilsan til starvsfólki á heiminum á Mýrinum.
Og til tykkum øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Børnini**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, ið sýndu samkenslu, tá kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Jona Eidesgaard**

Tvøroyri

doyði og varð jarðað.
Tøkk til prest, kirkjutænarar og sangarar.
Tøkk fyri blómur og kransar og heilsanir og til tykkum øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Martin, Magni, Jóannes og Eyðdis**